Sosialurin

Nr. 201 - 21. oktober 2009

## Obama drápshóttanir hvønn dag

Tá George W. Bush var amerikanskur forseti, fekk hann einar sjey ella átta drápshóttanir um dagin í meðal, men síðani Barack Obama loysti hann av, hava drápshóttaninar ímóti amerikanska forsetanum verið 30 um dagin. Almenningurin fær sjáldan nakað at vita um hóttaninar, og tað er tann serliga trygdartænastan hjá forsetanum, Secret Service, sum kannar tær. Okkurt er tó likið út. Eitt nú hava fjølmiðlarnir skrivað um ein 59 ára gamlan mann í Kalifornia, sum er ákærdur fyri at hava sent Obama drápshóttanir.



## Tikin fyri krígsbrotsverk

Løgreglan í Kroatia hevur tikið sjey fyrrverandi hermenn, sum eru undir illgruna fyri at hava framt krígsbrotsverk undir borgarakrígnum í Bosnia í nítiárunum. Kroatisku myndugleikarnir eru sera fáorðaðir um málið, men ein talsmaður fyri løgregluna sigur, at ein frágreiðing kemur seinni. Kroatiska sjónvarpið sigur, at teir tiknu eru undir illgruna fyri at hava skotið fimm serbiskar fangar har vesturi í Bosnia í september í 1995, tá kroatiskir hermenn og bosniskir muslimar søktu at serbiska herinum.

# Brandur óbroytta støðu

**Hóast 14 av 20 stillarum á listanum, har Brandur Sandoy varð valdur, hava heitt á hann at skifta støðu í kommunustýrinum, so vil hann ikki bakka. – Tað eru seks stillarar, sum ikki hava skrivað undir, sigur Brandur Sandoy við Sosialin**

VALDSSTRÍÐ

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

At senda brøv er vorðið tað heilt stóra á Sandi. Fyrst fekk Páll á Reynatúgvu eitt bræv, har tað varð heitt á hann at leggja frá sær sum borgarstjóri. Síðan fekk Páll á Reynatúgvu aftur eitt bræv, har heitt var á hann at skipa soleiðis fyri, at eyka kommunustýrisfundur varð, so at nevndirnar kundu veljast av nýggjum. Og í gjár avdúkaði Dagur og Vika hjá Kringvarpinum, at Brandur Sandoy, sum ikki longur vil stuðla Pálli á Reynatúgvu, hóast teir vórðu valdir á lista saman, eisini hevði fingið eitt bræv.

Hvørki av fyrru brøvunum hevur enn givið nakað ítøkiligt úrslit, og Brandur Sandoy staðfestir, at heldur ikki brævið, sum Dagur og Vika hjá Kringvarpinum í gjár avdúkaði, fer at fáa nakra ávirkan.



*Eitt fleirtal av stillarunum, sum stillaðu Brand Sandoy upp til kommunuvalið á Sandi, vilja hava hann at broyta støðu í kommunustýrinum, men tað ætlar Brandur Sandoy ikki*

- Eg ætli mær ikki at bakka ein tumma. Einans 14 av teimum 20 stillarunum heita á meg at broyta støðu. Tí eru framvegis seks, sum stuðla mær, sigur Brandur Sandoy, tá Sosialurin spyr hann um brævið, sum varð umrøtt í Degi og Viku hjá Kringvarpinum.

Brandur Sandoy leggur afturat, at yvir 200 fólk valdu listan, har hann var uppstillaður, og at tað bara eru 14, sum vilja hava hann at broyta støðu.

- Tú kanst siga, at eg ikki havi broytt støðu. Eg haldi fast við tað eg segði, staðfestir Brandur Sandoy.

# Páll umhugsar fráfaring

**Hóast Páll á Reynatúgvu fyri tíð síðan staðfesti, at hann ætlar at leggja frá sær, so staðfesta útsøgnir í Degi og Viku hjá Kringvarpinum í gjár, at hetta ikki er heilt víst**

VALDSSTRÍÐ

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eljustríð hevur verið í kommunustýrinum á Sandi í fleiri mánaðir, eftir at tað kom fram, at fýra av sjey bygdarráðslimum heittu á Páll á Reynatúgvu at leggja frá sær sum borgarstjóri. Stutt eftir brævið, staðfestir Páll á Reynatúgvu í lesararbrævi, at hann vildi leggja kongin, og at hann á einum komandi kommunustýrisfundi, fór at leggja frá sær.

Men okkurt er broytt síðan tá.

Tað kom fram í Degi og Viku hjá Kringvarpinum í gjár, tá tíðindamaðurin spurdi borgarstjóran á Sandi, hvør verður borgarstjóri á Sandi um hálvt ár.

- Verður tað ikki eg sjálvur, so veit eg ikki hvør alternativið er, staðfesti Páll á Reynatúgvu í Degi og Viku í gjár.

### Undrar ikki

Henda útsøgn hjá Pálli á Reynatúgvu undrar tó ikki Brand Sandoy, sum ikki longur hevur álit á borgarstjóranum á Sandi, hóast teir vóru valdi á lista saman.

- Hetta var tað, vit roknaðu við alla tíðina. Men tað er altíð upp til borgarstjóran, hvat hann velur, sigur Brandur Sandoy

Sambært kommunustýrislógini verða borgarstjórar valdir fyri fýra ár í senn, og kunnu ikki krevjast frá undir vanligum fyritreytum.



*Hóast Páll á Reynatúgvu alment hevur boðað frá, at hann fer at leggja frá sær sum borgarstjóri á Sandi, so sáar hann iva um tað í almennari útsøgn*